Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í mentamálum

Evni: Bandasavnið hjá Kringvarpinum

Spurningar:

1. Hvar verður talgilda tilfarið í "Savnsgulli" hjá Kringvarpinum goymt?
2. Hvar verða upprunaligu bondini goymd?
3. Hvussu verður tryggjað, at ikki alt verður burtur, um eitthvørt skuldi hent – til dømis eldsbruni?
4. Metir landsstýriskvinnan, at tilfarið er forsvarliga goymt?
5. Um ikki, hvørjar ætlanir eru so fyri at goyma tilfarið forsvarliga?

Viðmerkingar:
Seinnu árini er eitt stórt arbeiði gjørt fyri at varðveita bandasavnið hjá Kringvarpinum. Tilfarið er alt talgilt, fyri at tað ikki skal farast av tíðarinnar tonn.

Tá slíkt stórarbeiði er gjørt, er umráðandi at goyma tilfarið soleiðis, at ikki alt forferst, um til dømis eldur skuldi komið í húsið, har tað liggur. Ein máti er at hava talgilda tilfarið á fleiri servarum, sum ikki standa í sama bygningi. Hetta verður gjørt, fyri at tryggja, at um ein servari verður raktur av eini ella aðrari hending, so er tilfarið framvegis varðveitt á einum øðrum servara.

Tí verður spurt, hvussu tilfarið hjá Kringvarpinum verður goymt.

Á Løgtingi, 4. apríl 2024

Helgi Abrahamsen